WEEK-END

DAGBÓK

Leygardagur 3. august.
Andreas Djurhuus, løgtingsmaður, umboðandi sambandið í Suð uroyar valdømi, 62 ár.
4. aug.: 8. sunnudagur eftir trinitatis.
5. aug.: Mánin næstur jørðini.
7. aug.: Sólarris kl. 4,12 og sólsetur kl. 20,52.
8. aug.: Full sól.
10. aug.: Lavrasmessa.
Vit eru í 17. viku á sumri.

Havnalívið

Tað er ikki lítið tal av skipum, ið leggur til á teimum størru havnaplássunum ymsastaðni í Føroyum, og her velst eisini um, hvussu stór skip, ið hava likindi at leggja at ella vitja tey ymisku pláss ini í teirra ym isku ørindum. Stórar havnaútbyggingar eru farnar fram tey seinastu árini, og hesar útbyggingar eru avgerandi fyri, hvussu nógv skip vitja hvørt staðið, eins og hvussu stórt hitt samlaða tonsatalið er og verður. Niðanfyri nøkur tøl, ið vísa skipavitjanir og samlaða tonsa talið í 1967.

	tal:	1000 t.
Tórshavn	**5.540**	**789,9**
Klakksvík	**1.484**	**250,7**
Fuglafjørður	**1.288**	**134,0**
Runavík	**1.211**	**163,9**
Tvøroyri	**1.079**	**211,0**
Vági	**504**	**72,2**

Hini ógrøðiligu sárini

Hagar hviti maðurin er komin, hevur tað altið verið vandamikið hjá teimum, ið livdu og áttu landið frammanundan, og framvegis er tað ræðuleiki at seta seg upp móti hvitamannavaldinum nógvastaðni.



Uttanfyri fongslið: sonurin hongdur — mamman grætur.

Svartur ella litaður — líka mikið. Gevur hann seg ikki und ir vald hvíta mansins, verður hann oftast ikki spardur, har imperialistiska hvørkratakið framvegis er fast og ikki hevur hug at sleppa ella linka takinum, hóast uttan- og innlendis frælsisrøddir gera vart við seg, at so má ikki vera, tí øllum menniskjum er tryggjað frælst at liva sam bært avgerðir og mangar viðtøkum Sameindu Tjóða.

Tey, ið harðast liða undir hvørkrataki hvíta manna, kenna byrðuna so tunga, at tey fylkjast til andstøðu og royna at rista okið av sær; men ofta roynist illa, og hin harða, hvíta hondin er fús til verka, tá tað ræður um atsóknir og hevnd móti teimum, hvørs einasta ynski er frælst lív — í egnum landi.

Byrsusmellir og hvørkrandi reip eru tí ikki ókend fyribrigdi, har fábólkar av hvítum framvegis royna at tryggja sær vald og ognir.

hugskot

LÝDNI FRAM UM FRÆLSI

Vesturtýski statsadvokaturin Fritz Bauer, sum doyði fyri kortum og var vorðin kendur fyri sítt virki at draga nasistiskar kriggsbrotsmenn fyri rættin, hevur oftani avmyndað, hvussu týskarar veruliga eru og hvussu lætt tað ofta er at fáa týskarar at visa lýdni, ein ikki kennir aðrastaðni frá. Millum annað segði hann á einum sinni:

* »Gjøgnum mong ættarlið hava
* týskarar latið seg rikið fram
* til skyldu, lýdni og dugnaskap,
* og hetta hevur gjørt teir til
* heimsins bestu embætismenn.
* Koma krepputiðir, og ein týsk
* ari fær valið millum lýdni og
* frælsi, velur hann tvørturimóti
* flestu øðrum, lýdni framum
* frælsi!«

Rímsmiðjan

HERSTØÐIN

Í fyrstuni var almikið skrivað og talað um hervaldið í Mjørkadali; men síðan kvinnur og menn fóru at kenna seg sum heima her — er tøgn allastaðni.

Nú Føroyar eru hersettar
og komnar uppi kalda kriggj,
hjá kvinnunum tað trýtur ei
við ju-ess-manna-friggj.
Menninir nú sleppa uppi part,
teir vitja hernaðarliðið,
sum í bløðunum, tú sært,
teir fáa eina kenning,
einki annað sker,
meðan kvinna ofta aftur
við sær ein litlan »yankie« ber!

VÆL SAGT

— Fáar, men vísar lógir gera eitt fólk lukkuligt, meðan nógvar lógir bróta niður rættarkenslurnar!
(Friðrikur Stóri)

— Hvat stýrislag er hitt besta? Tað, ið lærir okkum at stýra okkum sjálvum?

— Tað er lítil vinskapur í heiminum — allraminst millum javnlikar!

KIKKARIN

SVIKAPOLITIKKUR

Beint undan »sjálvstýrislandsstýrinum« var tað ikki lukkuligt, hvat »14. sept.« skuldsetti fólkaflokksmenn fyri at hava gjørt:

— Deyðarevsing innført.
— Føroyar gjørdar til danskt
— marinudistrikt.
— Danskir hermenn og hundar beittir eftir føroyingum.
— Føroysku fiskimiðini avreidd.

5 spurningar

1) Hvat vegar ein klippfiskapakki til Italiu?
2) Hvussu eitur prestagarðurin í Kvívík?
3) Hvar verða hvítu blóðlikamini gjørd?
4) Hvør var Demikritos?
5) Hvussu eitur høvuðsstaðurin í Costa Rica?

SVAR: 1) 46 kg. 2) Kirkjuteigi 3) í millilum 4) kendur filisoffur (460—370 f. Kr.) 5) San Jose.

MANGT OG HVAT

Tonnin hjá Haraldi Blátonn

Hvar er tað føroyska skúlabarnið, ið ikki hevur lisið um Harald Blátand, sum vann Danmark og Noreg og kristnaði danir?

Nú er tað hin bláa tonnin hjá Haraldi, teir skulu leita eftir, og hetta skal fara fram í sambandi við, at býurin Vejen heldur 1001 ára føðingardag. Hann, ið finnur tonnina skal fáa kongiliga heiðursgávu.

Ætlandi hevur Haraldur ongatíð havt nakra bláa framtonn. Hetta striðast teir lærdu um.

Men teir flestu eru av teirri áskoðan, at »blá« í hesum føri merkir stór, og at »tand« merkir høvdingur — t.v.s. Harald hin stóri høvdingurin, ti hann megnaði at samla Danmark og Noreg til eitt ríki.

Líka so blá, sum tonnin hjá Haraldi skuldi vera, siga menn, líka so hvítur er tann elefanturin í Afriku, sum øll kenna, men eingin hevur sæð — og tí er vorðin symbol uppá nakað óveruligt.

Haldari av SOSIALINUM gerst ein við at venda sær til posthúsið

Veitst tú


AT UNDIR "SJÁLVSTÝRISLANDSSTÝRINUM" FORÐAÐI FÓLKAFLOKKURIN FYRI AT YVIRTAKA FÓLKASKÚLAN.

AT nógvar av teimum stóru ameri kansku fyritøkunum nú oftast seta kvinnur og menn, ið farin eru um 40 ár til skrivstovuarbeiði, tá tað er royndur lutur, at tey yngru hava hug at skifta starv í heilum.

AT ein menniskja vegar minni við ekvator enn á øðrum breiddar stigum. Ein menniskja, sum vegar 100 kg. við Norð- ella Suðurpólin, vegar ½ kg. minni við ekvator, orsakað av snúðingsferð jarðarinnar.


AT sambært árbókina hjá franska vísindaliga akademiinum verður trý problemir, sum vísindamenn ongantíð fara at loysa: perpetuum mobile, kvadraturin í sirklinum og tríbýtið av vinklinum.

GÁTUR



Yvir: 1) fuglur 6) hini 7) undir fóti 9) skipastytting 10) ljós 12) akfar 14) kúgan 17) rok 19) gjaldið

Niður: 1) fuglar 2) bindiorð 3) lær 4) leik 8) flenti 11) stilli 13) hol 15) plagg 18) skipastavir




Tá tú hevur funnið orð fyri myndunum, tekur fyrsta bókstavin úr teimum, og setur teir rætt saman, fært tú heldur sjaldsom hjún.

TIL ÚTFYLLINGAR

Set hjáljóð í staðin fyri strikurnar, og tú fært:

1) U — — A — — — = land
2) — I — A — A = høvuðsstað
3) — O — — A — — — = oyggj

FÝRAKANTURIN



1 = lappa
2 = illur
3 = vektmikil
4 = øsa



Ikki taka pillarar
siga pavamenn í Rom.
Í Indiu har eta menn
p-pillarar sum bomm!

* * *

— Eg skal keypa eina dós av sama slag pillarum, sum mamma keypti í gjár.

— Ja, ja, dámdi henni teir so væl?

— Nei, tað veit eg ikki, men teir passa so væl til luftbyrsuna hjá mær.

* * *

Fólk, ið ikki tora at siga, hvat tey hugsa, hugsa ætlandi ikki!

* * *

Per: Mamma er so rund, so tað er vist ein hálvbeiggi.
Pól: Hálvbeiggi, hvat meinar tú við tí?
Per: Ja, eg meini, hann er ikki liðugur enn.

AT tá ið Ludvik 14. búði í Versailles-borgini var fólkatalið stórt við hvørt. Hann hevði minst 1000 aðalsmenn sum gestir, og hesir høvdu 4000 tænarar við sær. Aðrir 5000 tænarar búðu har frammanundan.